Beinir Johannesen
vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)
(Leingja tíðarskeiðið fyri fulla endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við íløgur í hitapumpuskipanir til eisini at fevna um 2024)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 22. mai 2023 verða í § 3 d, stk. 1, 1. og 2. pkt. orðað soleiðis:

"Í 2021, 2022, 2023 og 2024 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2025 verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldið."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Løgtingið samtykti á vári 2022 ein orku- og veðurlagspolitikk, ið hevði eina røð av átøkum, ið skuldu fremjast (LM 130/2021).

Átak nr. 13 í røðini var mvg-frítøka til góðkendar hitapumpur, har tilmælið var, at tað heldur fram til 2025, og síðan verður endurskoðað. Hetta fyri at eggja fólki til at velja eina grøna orkuloysn ístaðin fyri eina dálkandi.

Tað verður ikki mett at vera rætt, at tá borgarar hava handlað í teirri trúgv, at frítøkan verður longd, at man so frá landsstýrisins síðu ikki handlar uppá tað.

Eisini er støðan tann, at jarðhitaboringar vórðu steðgaðar av kommunum í summar. Hetta gjørdi bíðitíðina enn longri eftir at fáa eina grøna orkuskipan.

Fyri at borgarar ikki skulu koma illa fyri av ymsum orsøkum, so er tað rættast um frítøkan heldur fram, eins og orku- og veðurlagspolitkkurin leggur upp til.

Við hesum uppskotinum verður mvg-frítøkan longd til at halda fram í 2024, soleiðis at alt meirvirðisgjaldið eisini verður endurgoldið í komandi ári eins og seinastu árini.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Eftir galdandi lóg verður afturberingin av meirvirðisgjaldinum minkað niður í helvt fyri komandi ár og 2025, meðan onki verður endurrindað frá 2026 og fram. Við hesum uppskoti til broytingarlóg verður eisini latin full mvg-afturbering í 2024. Kostnaðurin av hesum er torførur at meta um, m.a. tí at hann er tongdur at rentuhækkingum, prísvøkstri og muninum millum avgerðir hjá húsarhaldunum, tá umræður umlegging til grønar orkuloysnir undir núverandi skipan við fullari mvg-afturbering samanborið við undir eini skipan við hálvari mvg-afturbering.

Hóast fíggjarligar avleiðingar eru av uppskotinum, so verður talan um somu útreiðslur av endurrindan av grønum orkuskipanum, ið hava verið higartil, meðan skipanin hevur verið í gildi. Talan verður sostatt ikki um meirútreiðslur orsakað av hesum uppskotinum, um samanborið verður við undanfarin ár, tí skipanin við hesum verður verandi tann sama í eitt ár afturat.

Ongar umsitingarligar avleiðingar eru av uppskotinum, tí talan er um leingjan av eini skipan, ið longu er í gildi.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Við verandi lóg minkar mvg-afturberingin til hitapumpur í 2024 niður í helvtina av meirvirðisgjaldinum. Við hesi broyting verður skipanin við fullari mvg-afturbering longd til eisini at umfata 2024.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 2. november 2023

Beinir Johannesen